tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 26.09.2024 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 58/24 | 24/00233-2 | P/F Varðin Pelagic - Uppskot til Umhvørvisgóðkenning av virkinum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri til hoyringar |
| 59/24 | 24/00248-1 | Fíggjarætlan 2025 |
| 60/24 | 24/00251-2 | Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn -Umsókn um stuðul til rakstur, viðlíkahald og løn til starvsfólk TBS2024 |
| 61/24 | 24/00247-2 | TB Flogbóltur -umsókn um stuðul til kappingarárið 24/25 |
| 62/24 | 24/00199-1 | TB Fótbóltur - Uppskot um klædnaskáp til skiftirúmini hjá heimaliðnum við Stórá |
| 63/24 | 24/00122-1 | Seglloftið -innbúgv |
| 64/24 | 24/00258-3 | Fólkabókasøvn og samstarvsavtalur |
| **Til kunningar** | | |
| 19/24 | 24/00177-2 | KF -Uppskot til Løgtingslóg um integratión til ummælis |
| 20/24 | 24/00249-3 | Skúlastýrið -árligur fundir við skúlastýrið 2024 |
| 21/24 | 24/00004-1 | Skattatøl 2024 |
| | | |

Kristin Michelsen lesur skránna til býráðsfundin í dag og kunnar um, at mál 64/24 *“ Mýrifípan - støðulýsing av barnaansingini”*, ið er í almennu skránni verður tikið av skrá og viðgjørt sum lukka mál.

Kristin Michelsen spyr um viðmerkingar eru til skránna, ongin viðmerking

Eyð Eidesgaard metir seg at verða ógegniga í viðgerðini av *“58/24 P/F Varðin Pelagic - Uppskot til Umhvørvisgóðkenning av virkinum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri til hoyringar”*, og fór av fundinum til hesa viðgerðina.

**Til støðutakan**

**58/24**
**24/00233-2 P/F Varðin Pelagic - Uppskot til Umhvørvisgóðkenning av virkinum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri til hoyringar**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.09.2024 | 40/24 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 11.09.2024 | 33/24 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 26.09.2024 | 29/24 |
| 4 Býráðið | 26.09.2024 | 58/24 |

**Málslýsing:**
**Georg Müller**
Umsitingin hevur tann 06.09.2024 móttikið teldupost frá Umhvørvisstovuni, ið er soljóðandi:

*Hervið verður uppskot til umhvørvisgóðkenning av virkinum hjá P/F Varðin Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri sent tykkum til hoyringar*

*Hoyringsfreistin er 4 vikur, til og við 4. oktober. Um ongar viðmerkingar eru til uppskotið, verða tit eisini biðin um at boða Umhvørvisstovuni frá hesum.*

Viðheft í sama teldupost er eisini skjalið "*Uppskot til Umhvørvisgóðkenning av virkinum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri*"

**Tekniski leiðarin 10.09.2024 GM**
Umsitingin hevur viðgjørt hoyringarskrivið og hevur ongar viðmerkingar.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um umhvørvisvernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Vinnu- og havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnar- og umhvørvisnevndini, samt býráðnum til ummælis og støðutakan

**Tekniska nevnd 11. september 2024:**
Nevndin er kunnað um og hevur gjøgnumgingið hoyringarskrivið og hevur ongar viðmerkingar.

**Vinnu- og havnanevndin 11. september 2024:**
Eftir at hava viðgjørt hoyringarskrivið í nevndini, eru ongar viðmerkingar

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 26. september 2024:**
Uppskotið til umhvørvisgóðkenning er viðgjørt, og nevndin hevur ongar viðmerkingar.

**Býráðið 26. september 2024:**
Eyð Eidesgaard metir seg at verða ógegniga í viðgerðini av hesum málinum og fór av fundinum.
Hoyringar uppskotið til Umhvørvisgóðkenning av virkinum hjá Varðanum Pelagic á Tvøroyri verður samtykt einmælt uttan vimerking.

**59/24**
**24/00248-1 Fíggjarætlan 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.09.2024 | 49/24 |
| 2 Býráðið | 26.09.2024 | 59/24 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 14.09.20243)**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 26. september og aðru viðger áðrenn 1. Desember 2024. november.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2025 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 20,9% og 8.000 kr.

Fortreytirnar í uppskotinum eru, at rakstrarútreiðslur kunnu bert hækka, um talan er um:

- Lógarkrøv.
- býráðssamtyktir íroknað virksemisbroytingar, sum fylgja av nýggjum íløgum.
- sáttmálabroytingar og líknandi.

Mælt verður til at Fíggjarætlan “FÆ2025” verður viðgjørd av Tvøroyrar býráð sum niðanfyri:

- 26. september, 1. viðgerð av fíggjarætlan “FÆ2025”, har ásett verður barnafrádráttur, skattaprosent, rakstar og íløguætlanir fyri 2025.
- Áðrenn 1. desember 2024, 2. viðgerð og endalig viðgerð av ”FÆ2025”

**Lyklatøl**
Samb. Fráboðan frá TAKS, eru skattainntøkur fyri 2025 mettar at blíva: **kr. 72.996.177,-**

Inntøkugrundarlagið er grunda á:

- Kommunuskattur 20,9%
- Barnafrádráttur kr. -8.000,-

**Skattagrundarlag:**

| | | |
|---|---|---|
| A-inntøka: | *377.298.700,-* | |
| B-Inntøka: | *21.424.900,-* | **398.719.600** |
| FAS-Inntøka: | *(-6.315.634,-)* | |
| Inntøkufrádr.: | *(-904.521,-)* | |
| Sjófrádr.: | *(-1.449.928,-)* | **(-8.670.083,-)** |
| Botnfrádráttur: | *(-40.785.511,-)* | **(-40.785.511,-)** |
| **Kommunalt skattagrundarlag** | | **349.264.007,-** |
| Komm.skatt: (20,9%) | ***72.996.177,-*** | |
| Barnafrádráttur: (386 x 8.000,-) | *(-3.088.000,-)* | **69.908.177,-** |

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

- *Samb. løgtingslóg um kommunustýri er ásett í § 39, at fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*
  - *Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.* ***Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember****.*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjarætlan fyri 2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 24. september 2024:**
Einmælt samtykt at áseta kommunuskattin til 20,9% og barnafrádráttin til kr. -8.000,- fyri fíggjarárið 2025. Fíggjarnevndin mælir til, at býráðið kemur saman í viku 43 at viðgerða rakstrar- og løguætlan fyri fíggjarárið 2025.

**Býráðið 26. september 2024:**
Einmælt samtykt fyrstu viðgerð av fíggjarætlan fyri 2025, og áseta kommunuskattin til 20,9% og barnafrádráttin til kr. -8.000,-.

**60/24**
**24/00251-2 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn -Umsókn um stuðul til rakstur, viðlíkahald og løn til starvsfólk TBS2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.09.2024 | 57/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.09.2024 | 59/24 |
| 3 Býráðið | 26.09.2024 | 60/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16. sep. 2024**
Nevndarform. fyri Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn søkir um at fáa útgoldið stuðulsjáttan til raksturin av savninum.
Tvøroyrar kommuna hevur á Fíggjarætlan fyri ár 2024 játta stuðul á kr. 325.000,- til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúðin og Løgtingslóg um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986

**Fíggjarligar avleiðingar:** Rakstrarkonti §528 Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn útgreina: (Játta í alt FÆ2024 kr. 325.000,-)

**Býti av stuðulsupphædd:**

- Rakstur av bygningum og hølum: kr. 50.000,-
- Lønir til starvsfólk: 175.000,-
- Umvælingar: kr. 100.000,- (Krevur útgreining/skjalprógv fyri umvæling)

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 16. september 2024:**
Einmælt samtykt játta stuðul samsvarandi umsókn og játtan á FÆ2024. -málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. september 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. -málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 26. september 2024:**
Einmælt samtykt tilmæli hjá fíggjarnevndini og mentanarnevndini, at lata í stuðul kr. 325.000,- til Tvøroyrar Bygda- og Sjóvinnusavn til teirra virksemið fyri ár 2024.

**61/24**
**24/00247-2 TB Flogbóltur -umsókn um stuðul til kappingarárið 24/25**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.09.2024 | 56/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.09.2024 | 58/24 |
| 3 Býráðið | 26.09.2024 | 61/24 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá TB-Flogbóti til kappingarárið 2023/2024.

Upplýsast kann at TB-Flogbóltur hevur fingið í stuðul frá Tvøroyrar kommunu sum niðanfyri:

- 2019 kr. 110.000,-
- 2020 kr. 130.000,-
- 2021 kr. 130.000,-
- 2022 kr. 130.000,-
- 2023 kr. 130.000,-

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024, 524 20. Stuðul til ítrótt

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 16. september 2024:**
Einmælt samtykt at lata kr. 130.000,- í stuðul til TB flogbólt -málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. september 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. -málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 26. september 2024:**
Einmælt samtykt tilmæli hjá fíggjarnevndini og mentanarnevndini, at lata kr. 130.000,- í stuðul til TB flogbólt kappingarárið 2024/25.

## 62/24
## 24/00199-1 TB Fótbóltur - Uppskot um klædnaskáp til skiftirúmini hjá heimaliðnum við Stórá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 17.07.2024 | 46/24 |
| 2 Mentanarnevndin | 16.09.2024 | 47/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.09.2024 | 56/24 |
| 4 Býráðið | 26.09.2024 | 62/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 17.07.2024**
TB hevur sett fram ynskið um klædnaskáp til skiftirúmini við Stórá.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanar nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mál ref.** 24/00158 (málið er viðgjørt sum niðanfyri)

**Mentanarnevndin 22. maj 2024:**
Umsitingin verður biðin um at innheinta fleiri tilboð uppá innbúgv til skiftirúmini, og vendir aftur til nevndina.

**Mentanarnevndin 26. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað -Umsitingin hevur umbiði tilboð, sum enn ikki eru innkomin. Málið verður útsett til ein seinni fund.

**Mentanarnevndin 17. juli 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað. Umsitingin innheintar fleiri tilboð, og málið verður tikið upp á einum seinni fundi.

**Kommunustjórin 13.09.2024:**
Umsitingin hevur móttikið 2 tilboð uppá tilfar til dagføring av tveimum skiftirúmum við Stórá: (ex.mvg og umppsetan) -ongin ávís játtan avsett á FÆ2024

1. RBT: kr. 139.099,-
2. Idé møblar: kr. 229.500,-

**Mentanarnevndin 16. september 2024:**
Einmælt samtykt at dagføra skiftirúmini við Stórá, samb. tilboð frá RBT. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. september 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við Mentanarnevndini.

**Býráðið 26. september 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini at dagføra skiftirúmini við Stórá, samb. tilboð frá RBT.

**63/24**
**24/00122-1 Seglloftið -innbúgv**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 22.04.2024 | 28/24 |
| 2 Mentanarnevndin | 16.09.2024 | 52/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.09.2024 | 54/24 |
| 4 Býráðið | 26.09.2024 | 63/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 22.04.2024**
Form. í mentanarnevndini ynskir at viðgerða játtan, tørv og veitan til innbúgv til hølir hjá kommununi.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024 §609, játta kr. 150.000,- til Seglloftið

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanar nevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 22. april 2024:**
Einmælt samtykt, at heimila umsitingini at arbeiða við uppskotum til nýtt innbúgv til Seglloftið, ið verður lagt fyri nevndina til støðutakan.

**Kommunustjórin 14.08.2024:**
Umsitingin hevur vent sær til 2 veitarar, ið hava latið tilboð uppá:

- 160 stólar (RBM NOOR)
- 40 borð klapp saman 140*80
- Vogn til flutning og goymslu av borðum
- Kostnaðurin liggur á uml. kr. 250.000,-, ið er kr. 100.000,- meira enn avsett á FÆ2024

Mentanarnevndin skal taka støðu til innkomin tilboð, og um farast skal víðari við fyriliggjandi uppskotið ella um hetta skal tillagast. Mælt verður til at veita eykajáttan av §609  til keyp av nýggjum inventar til Seglloftið.

**Mentanarnevndin 16. september 2024:**
Einmælt samtykt at keypa inventar samb. tilboð/uppskot, men at veitingin -*nøgd av borð og stólum*- verður innafyri verandi játtan. -málið verður beint í fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin 24. september 2024:**
Einmælt samtykt til mælið hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 26. september 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini at keypa inventar samb. tilboð/uppskot, har nøgd av borð og stólum verður innafyri verandi játtan.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

## 64/24
## 24/00258-3 Fólkabókasøvn og samstarvsavtalur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.09.2024 | 60/24 |
| 2 Býráðið | 26.09.2024 | 64/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.09.2024**

**Upprunin til málið**
Nýggj lóg um fólkabókasøvn og tænastur

Nýggja bókasavnslógin áleggur fólkabólkasøvnum við útbúnum starvsfólki at samstarva við bókasøvn í teimum kommunum, sum ikki hava starvsfólk við bókasavnsfakligari útbúgving.

Trý bókasøvn hava útbúnar bókavørðar. Bókasøvnini í Klaksvíkar kommunu, Runavíkar kommunu og Tórshavnar kommunu. Almanna- og mentamálaráðið hevur lagt ein leist, at Býarbókasavnið tekur upp samstarv við kommununar fyri sunnan (kommununar í Sandoy og kommunurnar í Suðuroy).

Í so fall at semja fæst við Tórshavnar kommunu um hendan leist, skal Tórshavnar kommuna gera avtalur um at býarbókasavnið veitir tænastur við kommunurnar fyri sunnan.

Kommunurnar kunnu søkja um stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum, samsvarandi kunngerð um stuðul til menning av fólkabókasøvnum. Stuðulin hevur seinni árini verið 1,28 mió kr. Men í nýggju bókasavnslógini er stuðulin til menning minkaður til 670tkr til Tórshavnar kommunu og sama upphædd er sett av til Klaksvíkar bókasavn og bókasavnið við Løkin við tí treyt, at ávikavist Runavíkar kommuna og Klaksvíkar kommuna samstarva við aðrar kommunur, sum ikki hava starvsfólk við bókasavns fakligari útbúgving.

Higartil hevur býarbókasavnið søkt um og fingið stuðul svarandi til 1,28 mió kr. Almanna- og Mentamálaráðið skal í kunngerð lýsa stuðulin áðrenn 1. September. Tórshavnar kommuna hevur kunnað Almanna- og mentamálaráðið um, at málið verður lagt fyri mentamálanevnd í september. Síðani verður kunnað um avgerð nevndsins.

Landið hevur ætlanir um at stuðla keyp av talgildum tænastum við 350.tkr. Býarbókasavnið fær í mesta lagið 150tkr av stuðlinum. Harumframt stuðlar landið við keyp av bókum fyri eina ókenda upphædd. Ein partur av stuðulin til menning av fólkabókasavnstænastu er treytaður av, at kommunurnar í Sandoy og í Suðuroy taka undir við tænastusáttmálanum við býarbókasavnið. Lógir, ásetingar o.a. Løgtingslóg nr. 78 frá 1. Juni 2023 um bókasøvn Kunngerð um stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 78 frá 1. Juni 2023 um bókasøvn Kunngerð um stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum

**Fíggjarligar avleiðingar: ja**

**Viðgerð Tórshavnar kommuna**

***Tilmælið:***

*Tilmæli: Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og býarbókavørður í Tórshavnar kommunu mæla til, at Tórshavnar komuna ger avtalu við kommunurnar í Sandoy og í Suðuroy um fólkabókasavnstænastur samsvarandi dagførdu kunngerðini og at játta Býarbókasavnið 550 tkr í meirútreiðslu í fíggjarætlanini 2025.*

***Mentamálanevndin 11. september 2024: (Tórshavnar kommuna)***

*Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.*

***Fíggjarnevndin 19. september 2024:***

*Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.*

***Býráðsfundur 19. september 2024:***

*Einmælt samtykt.*

**Tilmæli kommunustjórin hjá Tvøroyrar kommunu 22. september 2024:**

Kommunustjórin hjá Tvøroyrar kommunu mælir til, at Tvøroyrar kommuna ger avtalu við Tórshavnar kommunu um veitan av fólkabókasavnstænastur samsvarandi Løgtingslóg nr. 78 frá 1. Juni 2023 um bókasøvn og Kunngerð um stuðul til menning av fólkabókasavns-tænastum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. september 2024:**

Málið var umrøtt og kunnað. Heitt verður á umsitingina um at samskifta við Tórshavnar kommunu um møguliga samstarvsavtalu, sum verður lagt fyri býráðið.

**Býráðið 26. september 2024:**

Einmælt samtykt at heimila umsitingini at samráðast við Tórshavnar kommunu og grannakommunur um samstarv um fólkabókasavn. Býráðið verður á einum seinni fundi at viðgerða uppskot til samstarvsavtalu.

**Til kunningar**

## 19/24
## 24/00177-2 KF -Uppskot til Løgtingslóg um integratión til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 27.06.2024 | 46/24 |
| 2 Mentanarnevndin | 16.09.2024 | 51/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.09.2024 | 55/24 |
| 4 Býráðið | 26.09.2024 | 19/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.06.2024**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá løgfrøðinginum hjá KF, við uppskot til Løgtingslóg um integratión til ummælis.

Kunna verður um at talan er um nýggja lóggávu – ongin lóg er frammanundan, og hava kommunurnar ein týðandi leiklut í uppskotinum:

Sagt verður frá at Freistin at lati inn ummæli til Løgmálaráðið er hósdagin 1. august 2024.

Lógin leggur upp til at:

- *Skotið verður upp at landið skal býtast landafrøðiliga í integratiónsøkir.*
- *Kommunurnar í integratiónsøkinum skulu samstarva um ein felags integratiónssamskipara.*
- *Integratiónsøkini verða tey somu sum barnaverndarøkini.*
- *Eisini fáa kommunurnar skyldu til at veita skipaða málmenning á aldurssvarandi stigi á dagstovnunum.*
- *Lógin kemur í gildi 1. januar 2025 og er galdandi fyri tilflytarar, sum fáa uppihaldsloyvið eftir hendan dag.*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan/kunning.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Einmælt samtykt at beina málið í mentanar nevndina.

**Mentanarnevndin 16. september 2024:**
Málið er umrøtt og kunnað, nevndin staðfestir, at her er talan um enn eina álagda útreiðslu til kommununa. Málið verður sent til býráðið til kunning.

**Fíggjarnevndin 24. september 2024:**
Málið er umrøtt og kunnað, fíggjarnevndin er samd við staðfestingina hjá mentanarnevndini. Málið verður beint í býráðið sum kunning.

**Býráðið 26. september 2024:**
Málið er umrøtt og kunnað.

## 20/24
## 24/00249-3 Skúlastýrið -árligur fundir við skúlastýrið 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
| --- | --- | --- |
| 1 Býráðið | 26.09.2024 | 20/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 20.11.2024**
Avtala er gjørd við forkv. í skúlastýrinum at møta til fundin at greiða frá arbeiðinum í skúlastýrinum, við atlitið til fíggjarætlan hjá Tvøroyrar kommunu 2025.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 85 frá 16. mai 2022

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2025**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 26. september 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**21/24**
**24/00004-1 Skattatøl 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 2/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 4/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 5/24 |
| 4 Býráðið | 25.03.2024 | 9/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 8/24 |
| 6 Býráðið | 06.05.2024 | 13/24 |
| 7 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 9/24 |
| 8 Býráðið | 06.06.2024 | 14/24 |
| 9 Býráðið | 17.07.2024 | 18/24 |
| 10 Býráðið | 26.09.2024 | 21/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2024**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2023/2024

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024/2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 17. juli 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 26. september 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

Fundurin lokin kl. 17:50

______________________________

Kristin Michelsen

______________________________

Anita Vibergsdóttir

______________________________

Alvi Mortensen

______________________________

Jónleyg Jespersen Bech

______________________________

Bjarni Hammer

______________________________

Kristina Roest

______________________________

Eyð Jóna Eidesgaard